# Hallur beint frá hjartanum

**Totalt professionellur og við hjartanum við í hvørjum tóna legði Hallur Joensen enn einaferð allar country fjepparar fyri sínar føtur**

SUMMARFESTIVALUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Mureldur*

Hóast Eyðun og Terji framvegis spældu á Vágsbøi, var Flagstjaldið longu stúgvandi fult av fólki, tá nýggi føroyski countrykongurin, Hallur Joensen, trein á pallin um hálvgum nígguíðina leygarkvøldið.

### Í góðum hondum

Lítil ivi er um, at hetta var løtan, mongu country fjepparnir høvdu bíðað eftir. Og tey gjørdust ikki vónsvikin. Enn einaferð prógvaði sjarmerandi klaksvíkingurin, hvussu langt tað røkkur, tá professionalisma og kensluborna country huglagið ganga upp í eina hægri eind.

Við løgum sum ”Give my love to Rose” hjá Johnny Cash fekk Hallur Joensen fjøldina at liva og vagga við – summi í onkrum, ið mest líktist einum kjálkadansi.

Og meðan sterka røddin hjá Halli Joensen fekk ”Seven Spanish Angels” hjá Wille Nelson at runga út í hvønn krók, manglaði lítið í, til løtan gjørdist ársins besta country- og dansikvøld hjá mongum.

Sermerkti róligi og altíð professionelli framburðurin hjá Halli Joensen gav eina tryggja kenslu av, at tónleikararnir aftanfyri hann vóru í góðum hondum.

Ikki tí vandi nakrantíð var á ferð, tí við sær á palli leygarkvøldið hevði Hallur Joensen ein óvanliga væl samanspældan hóp, settur saman av so frægum tónleikarum sum Jógvan Olsen, keyboard, Ólavur Øster, gittar og sang, Høgni Klakstein, trummur, Eyðun Nolsø, bass, Jákup Zachariassen, steelgittar og Beddi Hansen, gittar og mandolin umframt Christinu Bærentsen og hennara framúr góðu countryrødd.



*Við einum óvanliga væl samanspældum bólki aftanfyri seg legði nýggi føroyski countrykongurin, Hallur Joensen, allar country fjepparar fyri sínar føtur leygarkvøldið á Summarfestivalinum*

# Safir var deiligt!

»Eg síggi teg hvønn tann einasta dag«. Soleiðis byrjar sangurin »Tú ert so deilig!«, men tað kann ikki heilt sigast um bólkin sjálvan og áhoyrararnar. Tað er ógvuliga langt í millum, at hesir síggja hvønn annan. Men deiligir eru teir, tá teir standa á palli. Og deiligt hava áhoyrararnir tað eisini, tá teir báðir standa á pallinum. Inni í tjaldinum gloymdu áhoyrararnir alt um ófantaliga veðrið uttanfyri, meðan Tór Verland Johansen og Janus Trúgvason undirhildu.

Og undirhald var tað, tí Safir er meira enn bara tónleikur. Tað er meiri enn gittarin og djúpa røddin hjá Janusi Trúgvason, og celloin og snjalla røddin hjá Tór Verlandi Johansen. Safir er smíl og gleði, látur, orka og yvirskot.

Frá byrjan til enda var futtur í og gott lag. Øll tey góðu og kendu løgini vórðu spæld. Eisini lagi »Mánin«, ið væl kann brúkast til at taka samanum konsertina í gjár. »Grønt, fríkst og angandi, spælandi, fangandi« syngja teir, og júst hesi orð lýsa konsertina ógvuliga væl. Hon var eitt slag av eini mánaferð til eitt spennandi stað, ið vit ikki sleppa at uppliva so ofta. Men tá vit so eru har, er tað ”ááááh so skeg”, fyri at brúka síðstu regluna úr sanginum »Vaksin«.

Ein serstakliga góð og løtt konsert, frá tveimum ógvuliga væl uppløgdum monnum, ið eru alt ov sjáldan at síggja á palli.

**- rólant**



*Frá byrjan til enda var futtur í og gott*

# SIC er ektað



**SIC prógvaði aftur, at teir eru ektaðir. Ein sera sannforandi framførsla**

SUMMARFESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

SIC eru eins og Hate Speach var á sinni. Teir eru ektaðir og tí er tað so gott, at onnur enn fjepparar av hørðum tónleiki duga at síggja virðini í gróthørða tónlekinum.

Stuttligt at síggja foreldur, ið hildu seg afturi í teltinum, tí nýkonu tannáringar teirra hava áhuga í hesum tónleikinum. Og stuttligt at síggja ljóðmenninar, ið heilt klárt nutu hørðu og øru framførsluna hjá SIC.

Ein gróthørð framførsla á SummarFestivalinum, men sera góð, uttan mun til, um ein so er tungmálmsfjeppari, ella ikki.

Flagstjaldið er kanska ikki rætti karmurin um harða tónlekin, men SIC gjørdu sítt; SICkurt og gott, mest tí tað er ærligt.